

SLØKKILIÐ

*Leygardagin varð eisini felagsmynd tikin av Skálafjarðar Sløkkiliði, sum nú hevur stívliga 35 ár á baki*

# Teir hátíðarhildu stovningardag í nýggjum búnum

**SLØKKILIÐ Tað er 36 ár, síðan Skálafjarðar Sløkkilið varð stovnað, men tað eru 35 ár síðan, at felagið keypti sær útgerð og setti fyrstu sløkkiliðsmenninar. Nú hava allir teir 44 sløkkiliðsmenninir í økinum eisini fingið nýggjar búnar til umboðan**



*Sunleiv Højgaard hevur verið sløkkiliðsleiðari síðan ár 2000 – og í fulltíðarstarvi sum leiðari síðan ár 2007*





Vilmund Jacobsen

Leygarmorgunin var Sosialurin við, tá Skálafjarðar Sløkkilið bjóðaði kaffi, rundstykkir og wienarbreyð á Brandstøðini í Runavík.

Tað var her, at dagurin byrjaði, sum seinni um kvøldið endaði við veitslu fyri umleið 100 fólkum á Sjókaféini við Fjøruvegin í Runavík.

Sunleiv Højgaard, sløkkiliðsleiðari hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, sigur, at dagurin varð markeraður, tí 35 ár nú eru liðin, síðan teir fyrstu sløkkiliðsmenninir vórðu knýttir at felagnum, sum annars er stovnað í 1974.

Hann sigur, at hóast felagið varð stovnað fyri 36 árum síðan, eru nú 35 ár liðin, síðan felagið keypti sær útgerð, og fyrstu sløkkiliðsmenninir vórðu valdir og gjørdust knýttir at felagnum.

Og sigast kann ikki annað enn, at nógvir av hesum monnum hava verið ógvuliga trúfastir, tí á veitsluni á Sjókaféini leygarkvøldið vórðu ikki færri enn átta mans heiðraðir fyri 35 ára trúgva tænastu hjá sløkkiliðnum.

Maðurin, sum varð heiðraður fyri 25 ára tænastu, var sjálvur sløkkiliðsleiðarin, Sunleiv Højgaard, sum soleiðis hevur verið partur av hesum virksemi eina fjórðingsøld.

Sosialurin fer at venda aftur til sjálva heiðranina í einum øðrum blaði í hesi vikuni.

## Nýggjar búnar

Sunleiv Højgaard sigur, at 42 av 44 sløkkiliðsmonnum vóru til staðar leygarmorgunin. Bert tveir kundu ikki møta, ein eykamaður og ein sløkkiliðsmaður, sum var staddur uttanlands.

